Framhald av síðu 9

Kina. Fyrst vórðu bøndurnir tvingaðir inn í risastór sambýlir. Síðani fingu teir harraboð um t.d. at sáa fræið tættari, at sáa hveiti í staðin fyri bygg á háslættunum og at drepa allar spurvar (tí teir ótu fræið).

Í fyrstuni tóktust hugskotini hjá Róðursmanninum Mikla at bera frukt, og hvørvisjónin bleiv ikki minni glæsilig av tí, at hjartkiptir hagfrøðingar falsaðu síni hagtøl. Men skjótt var greitt, at framlopið var ein vanlukka. Jørðin, sum ikki toldi ta útpíning, sum stóðst av eitt nú ov tættari fræan, tornaði upp, hveitin treivst ikki upp í fjøllunum, spurvadeyðin økti um talið á smáum snúltidjórum osfr. Avleiðingin var størsta hungursneyð, sum heimssøgan veit um at siga.

Longu stutt eftir at teir høvdu tikið valdið í Kina, vóru Mao og hansara lagsbrøður farnir undir at fremja einsrætting, kúgan og morð í landinum. Tað velduga ríkið var sandrað við savningarlegum - *laogai*. Hóast milliónir vórðu skotnar ella píndar til deyðis, legði Mao sum heild størri dent á heilatvátt enn Stalin. Heilatvátturin, sum kundi taka mong ár, hevði til endamáls at rudda burtur sjálvt minsta tekin um sjálvstøðu ella persónleika hjá tí dømda.

Hvat pínsluháttum viðvíkir, ríkaði Róðursmaðurin Mikli ta stalinsku skipanina við ymiskum etniskum frábrigdum og nýskapanum. Eitt nú var tað rættiliga vanligt í Kina at jarða fólk livandi. Somuleiðis var mannaát vanligt, ikki sum nakað, fólk gjørdu av neyð, men sum ein partur av sannari, solidariskari mentan, og fólk kundu t.d. býta um børn við hesum framkomna endamáli. Summastaðni vórðu børn dripin, kókað og brúkt til tað.

TIBET

SUM LONGU nevnt bygdi USSR frá 1939 upp eitt imperialistiskt hjálandaveldi, sum serliga eftir 1945 víðkaði um sín haga, og sum ikki fór endaliga í søguna fyrr enn í 1989. Tá ið Kina árini 1950-51 gjørdi innrás í Tibet, tók Mao upp hesa somu imperialistisku kósina.

Atgerðirnar í Tibet — tvingsilssambýlir, savningarlegur, kúging og morð — raktu so meint, at talan at kalla var um fólkamorð. Sum Dalai Lama tók til, vóru hansara landsmenn "ikki bara skotnir, men eisini bardir í hel, krossfestir, brendir livandi, druknaðir, lamløstaðir, svøltaðir til deyðis, kvaldir, hongdir, kókaðir í hel, grivnir livandi, sundurskornir ella hálshøgdir".

Men meira áhugaverdur var ágangurin móti fólksins mentan og átrúna, sum varð nógv herdur, táið tibetanar í 1959 gjørdu uppreistur í Lhasa. Kleystur og tempul vórðu týnd, standmyndir smeltaðar um, heilag rit brend og mandalur sorlaðar. Landsins andaligi leiðari, Dalai Lama tann fjúrtandi, noyddist at flýggja við 100.000 monnum. Mentunarkollveltingin kom, og Mao beitti tann garvilla kinesiska ungdómin á landsins andsmennir. Tá ið hon var av, vóru 13 av 6259 kleystrum eftir í Tibet. Í 1973 hevði eitt stoypivirki í Beijing savnað saman 600 tons av tibetanskum standmyndum. Tibetanar noyddust at geva sínum børnum kinesisk nøvn, og til 1979 at geva teimum undirvísing á mandarin-máli. Mett verður, at ágangurin móti Tibet hevur kostað o.u. 800.000 mannalív.

STALINISMA OG FASCISMA

EFTIR HESA viðgerð — um stalinismunnar altjóðagerð — venda vit okkum til eitt annað mál, nevniliga sambandið millum stalinismu og fascismu. Vanlig hugsan hevur verið, at hesar rørslur, umboðandi ávikavist vinstra- og høgravongin, vóru andstaddar, so langt hvør frá aðrari sum hugsast kann. Men longu meðan tær vóru ungar, vístu nakrar heimspekingar og søgufrøðingar á, at tær í týðandi lutum vóru merkiliga líkar.

Felags fyri stalinismu og fascismu (og nazismu) er, at báðar hesar lærur venda sær ímóti fólkaræði, humanistiskum virðum og góðtiknum morali, og at tær, har tær valda, rudda av vegnum fólkaræðislig eyðkennir sum fundarfrælsi, talufrælsi og valdsins tríbýti.

Tað politiska valdið, soleiðis sum vit kenna tað í fólkaræðum í dag, nertir vanliga ikki tað, vit rópa intimsferuna, menniskjanna nærumhvørvi. Men bæði stalinisma og fascisma hertaka eisini intimsferuna, heimið, tankan, kenslurnar. Báðar lærur hava eisini tað í felag, at tær dyrka harðskap, ikki bara sum veg til eitt úrslit, men sum viði og hugtak. Tað er sigandi, at tann franski heimspekingurin Georges Sorel (1847-1922), ein tann fyrsti, sum hevur prísað harðskapi sum virði, helt nógv um kommunistin Lenin og fascistin Mussolini.

Skyldskapurin millum stalinismu og fascismu er ikki bara hugmyndafrøðiligur, men eisini ítøkiligur. Tað er sum oddamenninir í báðum rørslum kveita yvir um landamark og læra hvør av øðrum. Tá ið eldur kom í týska tinghúsið í Berlin í 1933, var Marinus van der Lubbe ákærður og dømdur fyri gerðina, hóast vanlig hugsan tá var, at nazistar høvdu sett eld á bygningin. Somu snildir vórðu brúktar, tá Kirov varð skotin í 1934, helst eftir boðum úr Kreml. Báðar hendingar vórðu brúktar sum undanførslur til at seta í verk ógvisligar útreinsingar.

Men tað kanska mest áhugaverda í hesum líkleika er, at báðar hesar lærur tykjast at umboða ein afturróður á farin søgulig mið, eina rebarbarisatión. Tað utopia, sum bæði Lenin, Stalin og Hitler lova sínum næmingum, er tann miðaldarligi dreymurin um eitt ævinligt ríki frítt fyri andsagnir, neyð ella ólukku. Eitt meginhugtak í hesum miðaldarliga universi er tankin um tey óndu, Antikrists fjøldir, sum skulu beinast av vegnum, áðrenn vegurin er gongdur, og tað eru, sum vita vita, í stalinismuni eitt nú kulakkar og í nazismuni jødar. Hitt meginhugtakið er tankin um Føraran, tann alvísa og algóða frelsaran, sum stendur á odda í stríðnum.

EITT KALT GOS ÚR MIÐØLDINI

RÆTTARMÁLINI Í Moskva og aðrastaðni, har teir ákærdu viðgingu seg sekar í gerðum, teir ikki høvdu gjørt, og har vitnisburður varð fingin til vega við píning, eru eitt gott dømi um hesa afturvendan til miðøldina. Eitt er, at tann løgfrøðiliga siðvenjan undir hesum sakum var miðaldarlig. Ikki minni forvitnisligt er, at vit í miðøldini finna dømir um rættarmál, sum í øllum lutum líkjast hesum sakum.

Fyrst í 14. øld setti franski kongurin Filip IV sær fyri at beina fyri tempulriddarunum, einamest tí hann tráaði eftir teirra ómetaliga ríkidømi. Í hesum atgerðum, sum fóru fram í tíðini 1307-14, vóru tempulriddararnir lagdir undir alskyns óreinsskap, skemd og gudloysi, og teir vórðu við píning hóttir til at viðganga seg sekar.

Tað eydnaðist kongi at smildra tempulharraregluna og fáa hennara ognir. Hóast atgerðirnar hjá Filip IV, aftur ímóti rættarmálunum í USSR í 20. øld, vóru amatørkendar, eydnaðust tær sera væl sum propaganda. Ikki fyrr enn í 1813 fóru søgufrøðingar at ivast í, um nakað var í hesum skuldsetingum.

STALINISMA OG TJÓÐSKAPUR

EIN ANNAR spurningur, sum hóskandi kann verða tikin upp í eini niðurstøðu, er sambandið millum stalinismu og tjóðskap. Ofta hevur verið ført fram, at kommunisman er ein altjóðarørslu, og at hon sostatt er í andsøgn til ta meira ráu, heimfødda og grefligu nationalismuna. Eftir mínum tykki er hetta sjónarmið ikki rætt. Kommunisman, og serstakliga stalinisman, hevði dám av stórrussiskari nationalismu og vendi sær av hesi orsøk ímóti mongum av teimum tjóðskaparligu rørslum, sum hildu fram at virka í landsins mongu tjóðarbólkum.

Í hesum sambandi kann tað víðka perspektivið, um ein ger vart við ein mun ella eina distinktión ímillum tvey sløg av tjóðskapi — tjóðskaparkenslu (t.e. nationala kenslu) og nationalismu. Tað fyrra av hesum hugtøkum fatar um ein natúrligan tokka til eins mál og mentan, flættaðan saman við eini - kanska kámari - fatan av samleika og einum vilja til at verja og varðveita henda samleika. Hetta slagið av nationalum hugburði er ein innankensla, sum sýgur sær megi úr tryggleika og støðufesti. Tað seinni slagið er ein harðrend chauvinisma, sum sýgur sær megi úr innantóma og innanótrygd, sum brúkar orðabrask og ofta í síni grund er autoriter.

Hetta seinna slagið av tjóðskaparkenslu — nationalisman — var ein flógv í stalinismuni. Mangar av atgerðunum, sum vórðu framdar móti ymiskum tjóðarbólkum í Sovjetsamveldinum — eitt nú royndir at russifisera Baltikum, seta fót fyri málstríðnum í Ukraina, tvingsilsflyta kekenar, asjketar, finnar og jødar — botna fyri ein part í hesi stórrussisku nationalismu. Ágangurin móti Tibet er dømi um hesa somu marxistisku imperialismu.

USA OG ÍSRAEL

MÓTI ENDANUM fari eg — bæði fyri at sleppa undan óneyðugum misskiljingum og fyri at fáa eina beinrakna mynd av stalinismuni í einum víðari samanhangi — at snúgva mær eitt bil frá evninum og stutt kveita at tveimum londum, sum vanliga verða rópt demokratisk, og sum mong bæði í Europa og USA, og serliga í Føroyum, hálvavegna dyrka sum fyrimyndir. Londini eru USA og Ísrael, og spurningurin ljóðar: Hava fólk, sum rópa seg kristin og demokratar, nakað at rósa sær av og nakað at kasta øðrum fyri — um ein hugsar um moral og sámiliga politiska siðvenju?

Í 1965 framdi herurin í Indonesia, stuðlaður og eggjaður av USA, eitt blóðugt kvett í landinum, sum hevði við sær, at Suharto herovasti setti á stovn eitt totalitert harðræði. Endamálið hjá USA var at leggja ríkidømið í landinum inn undir privatan amerikanskan kapital. Atgerðin kostaði o.u. 900.000 indonesum lívið. Síðani tá hava stórar fjøldir av indonesum livað eitt trælalív, við ómenniskjansligum arbeiði og at kalla ongari løn, serliga í Jakarta, har arbeiðaraøkini minna um eitt "kapitalistiskt GULAG".

Eftir bardagan 1948-49 millum Ísrael og tess arabisku grannalond (sum lupu á Ísrael), flýddu o.u. 700.000 palestinar úr teirra landi og teirra húsum til m.a. Transjordan, Sýria og Libanon. Israelskir talsmenn fórdu fram, at hesi fólk flýddu sjálvboðin og lokkað av teirra arabisku grannalondum. Seinni hava t.d. ísraelskir søgufrøðingar vístá, at sannleikin er øðrvísi og fløktari, og at ein av ymiskum grundum til tað stóra talið av flóttafólkum var, at ísraelar framdu "etniska útreinsan". Ísrael legði sostatt inn undir seg eitt landaøki, sum tað ikki átti, og henda imperialistiska atgerð varð framd við m.a. stuldri, terroratgerðum og morði.

Ein kundi kanska rópt hesar báðar hendingar dømir um ávikavist amerikanska og ísraelska stalinismu. Men hetta hevði verið at bronglað hugtøkini, og rættari er tí at siga, at sokallað demokratisk lond væl kunnu fremja brotsgerðir, ið standa mát við tær, sum Stalin og Mao framdu. Ein sleppur tí ikki undan at spyrja: Hvør er í grundini rættvísur, og hvør hevur rætt til at kasta tann fyrsta steinin? Og eiga ikki — eisini føroyskir — USA- og Ísraelsvinir viðhvørt at skammast?

FRAMTÍÐIN

TIL SEINAST kann vera spurt, hví ein rithøvundur heldur tað vera ómakin vert at viðgera eitt evni sum stalinismu í eini heilari greinarød. Tað er ikki torført at svara upp á henda spurning. Samstundis sum hetta evnið er ómetaliga viðkomandi, er merkiliga lítið upplýst og skrivað um tað, og í Føroyum at kalla einki.

Hinvegin er til skjals rættiliga fitt av tilfari, skrivað av fólkum, sum hava verið hugtikin av stalinismuni ella leninismuni. Eg havi valt ikki at taka hetta evni (sum hevði kravt eina serliga viðgerð) upp.

Men kanska er ikki av leið at nevna, til seinast, at tann føringur, sum kanska á fyrsta sinni av álvara viðgjørdi totaliter politisk rák, var rithøvundurin Jens Pauli Heinesen. Longu seinast í 50´árunum viðgjørdi Jens Pauli stalinismuna í Mentum (sum var ein deild av Dagblaðnum). Hann gjørdi vart við, at mannarættindir vórðu brotin á Kuba, eftir at Castro hevði tikið valdið har. Og í eini grein, sum minnist meg rætt hevði yvirskriftina "Lívsins gullskógvar", skrivaði hann beinrakið um sambandið millum ta trongu hugmyndafrøðina og tað livandi lívið.

Hvussu við framtíðini? Tann samanrenning av persónsdyrkan og utopiskum longsli, sum skapar rørslur sum stalinismu ella maoismu, sprettir úr menniskjans heila og hevur gróðrarlíkindir, tá ávísar samfelagsligar fyritreytir eru til staðar — kríggj, skipanarloysi, mentunarsyndran. Minnið um ræðulig tíðarskeið kann eina tíð fáa mannaættina til at taka betri partar fyri seg. Men hvørki í Russlandi ella Kina tykjast politikarar ella fólk sum heild at hava nakran vilja til tað slagið av søguligari sannkenning, sum heilsubót er í. Tær sálarligu og samfelagsligu matrisur, har nýggjar mannvondar messiasútgávur verða stoyptar, og seinni forgyltar, eru sostatt framvegis til. Mangt bendir á, at øldin, sum beint er byrjað, fer at síggja nýggj ikon rísa — ólík teimum gomlu í hami, meinlík teimum í holdi.

»At ferðast er at liva«(?)

Sitat: H. C. Andersen
Spurnartekin og klombur: Ása undir Kletti

HUGLEIÐINGAR
Ása undir Kletti
auk@post.olivant.fo

Eg havi verið ein svipp í Danmark. Fór avstað hósdag og kom aftur mánadag. Deiligur túrur hóast eg má viðganga, at ikki havi eg aktað so væl, síðani eg sat og stríddist við at binda hjá Frú Beier — "niðurí, tvørturum, ígjøgnum, burturav, niðurí, tvørturum, ígjøgnum, burturav", og hon legði okkum eina við ikki at koyra ígjøgnum hespuna. Eg sat, sum 7 ára gomul, lámur og lítil av vøkstri við einari hespu næstan á stødd við meg sjálva, so tit kunnu ætla úrslitið. Men akta gjørdi eg, eg koyrdi ikki ígjøgnum hespuna.

Ná. Vit høvdu valt at fara við Strandferðslubussinum vestur í Vágar. Gingu og biltu okkum inn, at Strandfaraskip Landsins vóru glað um hvønn kunda, sum valdi at koyra við teimum, tí sum eg skilji, hevur flogrutan sama trupulleika sum áttamannafarið á sinni - hon kvoður sín svanasong, eftir at undirsjóvartunnilin er latin upp. Men tað nervar ikki Strandferðsluna. Teir leggja ikki petti í, um tú gongur, koyrir í egnum bili ella rullar á rullskoytum vestur, so leingi tú ikki plágar tey við tínari nærveru. Einki legði bussførarin í, um vit vóru har ella ikki. Tað var ikki meira, enn hann orkaði at lata lúkuna upp, har viðførið skuldi setast. Tað stúvaðu vit sjálvi, tí hann var sum ein rakett inn aftur í bussin, meðan vit knossaðust og stríddust við viðførið, og tað var um reppið, at hann orkaði at taka ímóti pengum, tá vit betaltu. Rætt skal vera rætt. Hann reistist og kom út at lata lúkuna aftur, tá alt var leyst og liðugt. Og so fóru vit vestur. Sama mannagongd varð nýtt har vesturi. Út at lata upp, og so vrummmm — innaftur at sita! Kanska er tað soleiðis, at fakfelagið hjá bussførarunum noktar teimum at hjálpa ferðafólkinum við viðførinum. Eg loyvi mær at ivast í hesum, tí tá vit komu aftur úr Billund í Vágar, stóð ikki á hjá bussføraranum at stúva.

Komin vestur kekkaðu vit inn og settust at bíða. Nú varð rópt í hátalurunum um at koma til fráfaringarhøllina, og vit skundaðu okkum at taka passini fram, so vit ikki skuldu standa og fanglast við at leita eftir teimum, meðan eftirlitsfólkið ótolnaðist, køin vaks og vit gjørdust fjáltturstungin. Men ikki var neyðugt at vísa pass longur, tí sum fryntliga konan segði: "Sadam er eitt yvirstaðið kapittul." Okey. Og so stóðu vit og bíðaðu og bíðaðu sum seyður í rætt. Rúmið fyltist við fólki, men vit bíðaðu so fitt, til eitt starvsfólk kom rennandi og segði: "Hurðin er opin, skundið tykkum út og í flúgvaran." Og so smíltust vit eitt sindur tollut, aktaðu og skundaðu okkum út til flúgvaran.

Tá tú keypir ein flogferðaseðil, er tað so snilt, at bíleggingarseðil tað, flogfarið selir, liggur saman við billettini, so áðrenn vit fóru heimanifrá, fyltu vit út seðilin við tí, vit ynsktu at keypa. Vit hildu, at vit vóru ordiliga praktisk, tí nú var bert at handa starvsfólkinum lepan, seta seg afturá og njóta túrin. Vit so gjørdu, handaðu lepan yvir, og settu okkum væl afturá at durva. Við eitt stóð ternan uppi yvir okkum og proklameraði stutt og greitt, at "seðilin er ov gamal, tit mugu fylla ein nýggjan út," og so var hon burtur. Ná. Vit skundaðu okkum at akta og fyltu út einaferð afturat, og sjálvandi vantaði júst tað á nýggja dagførða lepanum, vit ætlaðu at keypa ommusoninum. Og omaná alt mundu vit gloymt at givið ternuni nýskrivaða lepan, og tað var ikki heppið.

Eg hevði sett mær lítlu taskuna "til gott" á dúrkið framman fyri meg, men fluks var ternan aftur har og minti meg á, at eg so sanniliga mátti seta taskuna í rúmið uppi yvir mær, meðan vit fóru upp frá. Eg skundaði mær at akta. "Og so kanst tú taka hana niður aftur, tá vit eru komin upp!" "Ja, mamma." Eg aktaði aftur.

Áðrenn vit fingu nakað at eta, skundaði eg mær at "fiska" borðið upp úr armleninum, so alt var klárt, tá tey komu við matinum. Aftur hetta fyribrigdið, har eg ikki vil vera til fortreð og órógva starvsfólkið, men geri alt fyri at gera øðrum til vildar. Aftaná, eg hevði etið, skundaði eg mær at klamsa borðið saman aftur og kroysta tað niðurí aftur armlenið. Sat og hugsaði, at vit kundar eru óførir, tí vit gera ein stóran part av tænastuni sjálv, ikki bert í flogfarinum, men næstan alla staðni. Vit stúva viðførið umborð á bussarnar, vit taka tað úr aftur og yvir á trekar vognar, vit rudda borðini, tá vit hava keypt okkum ein drekkamunn, vit rulla vognarnar upp á pláss, tá vit hava verið til handils ella ferðast, vit seta upp á hillar, tá vit koyra á gólv av óvart, o.s.fr. Vit akta so væl sum ongantíð fyrr og gerast ofta illa við, tí vit kenna okkum so býtt, tí vit kanska ikki eru nóg skjót at rudda, lyfta, gjalda, svara, fylla út, bera o.s.fr. Og ikki um at tala, tá vit standa við onkran kassa. Tá skunda vit okkum at finna kortið fram, repetera kotuna í høvdinum, so vit ikki standa sum drumbar og forða øðrum, sum eisini standa og repetera kotuna í høvdinum og skunda sær at finna kortið fram, tí tey heldur ikki vilja standa sum drumbar. Tað er so flóvisligt. Tað allarnýggjasta er, at vit eisini verða biðin, skrivliga, um at heingja tað, vit sjálv taka við inn í prøvarúmið í handlunum upp á pláss aftur. Nei, píkarill, um eg tími.

Minnist einaferð eg og ein vinkona vóru í Keypmannahavn og høvdu ringt okkum eftir einum taxabili. Tá hann hevði koyrt okkum hagar vit skuldu, rætti vinkonan honum dankortið. Tað var sum at vísa tarvi reytt. Hann var so spinnandi óður og rópti, hvat vit biltu okkum inn, tí vit ikki høvdu fortalt honum beinanvegin, vit komu í bilin, at vit ætlaðu at gjalda við korti. Vit sótu sum streinrunnar, meðan hann østi seg upp og var sum eitt ótt. Og soleiðis er muran nógvastaðni. Onkursvegna er munurin á veitara og kunda minkaður burtur í næstan einki. Vit eru til fortreð og bága, og handilsfólkið ynskir okkum niður og norð. Á, denn løgna verð.

Á veg heimaftur til Føroya, vitjaði eg handlarnar á flogvøllinum í Billund. Hevði gott eyga á onkrum plaggi — trolaði aftur og fram eina løtu, og satt at siga gjørdist eg so skakk, tá ein rødd blídliga spurdi, um hon kundi vera mær til hjálpar, at eg næstan small niður ímillum bikini og svimjidraktir í alskyns mynstrum og støddum. Eg kendi meg sum Jeppe í barónasongini. Eg trúði, at eg droymdi. Her var ein handilskona, sum visti, hví hon var til arbeiðis. Herligt. Ein fantastisk uppliving, og eg kann við góðari samvitsku siga, at á flogvøllinum í Billlund eru tey vinarlig og blíð. Sum Oddur tók til við glógvandi eygum: "Her biðja tey okkum góðan dag." Surprise! So vón er fyri frammman, hóast alt. Og kanska sleppi eg undan at akta!